# Tríggir úr Herfølge sóu reytt

John Faxe Jensen tykist framvegis leggja so nógv fyri, sum hann altíð hevur gjørt



Tríggir av liðfeløgunum hjá Jákupi Mikkelsen sóu ostaskorpuna hjá dómaranum, tá teir leygardagin leiktu móti B93, sum dagliga spælir í næstbestu donsku deildini

Jákup Mikkelsen og teir í Herfølge fyrireika seg við fullari ferð til at verja oddasessin í superliguni. Skulu vit døma út frá avrikinum leygardagin móti B93 úr næstbestu deildini, so verður ikki spart uppá krútið hvørki so ella so.

Venjingardysturin móti B93 endaði 1–1, og tað var ikki verri enn ilt hjá Jákupi Mikkelsen, sum ta síðstu løtuna bara hevði sjey viðspælarar frammanfyri seg.

Henrik Lykke er ein av teimum, sum tað hevur ljóðað, at útlendsk feløg skulu vera áhugað í. Hesa ferð gjørdi hann vart við seg við at verða rikin av vøllinum longu í 1. hálvleiki.

John Faxe Jensen, venjarin hjá Herfølge, hevur seinastu tíðina samráðst við leiðsluna í felagnum, um treytirnar fyri, at hann eisini skal verða stjóri í felagnum. Hetta er starvið, sum Kenneth Wegner hevði til eina ferð síðsta heyyst. Enn eru samráðingarnar millum felagið og venjarin ikki loknar. Men tað tykist sum um John Faxe Jensen ætlar sær framvegis at teljast millum spælararnar.

Leygardagin var hann á miðvøllinum, men har var hann bara inntil tíðliga í 2. hálvleiki. Tá sá hann reyða kortið og noyddist av vøllinum.

Herfølge skifti eftir 63 minuttir Jesper Heyde inn, men hann var bara sjey minuttir á vøllinum. Tá 70 minuttir vóru farnir, sá hann reyða kortið, og so var tað, at Jákup Mikkelsen og sjey liðfelagar stríddust við at halda tørn um 1–1 javnleikin, og tað eydnaðist, m.a. tí Jákup Mikkelsen bjargaði einum brotssparki.

### Síðstu fyrireikingarnar

Í Herfølge hava teir hesar fyrstu vikurnar vant níggju ferðir um vikuna. Umframt venjingardystin móti B93 skulu teir heima í Danmark eisini spæla móti Frem, Køge og Hvidovre. Leygardagin fer Herfølge til La Manga í Spania – tað er sama staðið, sum landsliðið (uttan Jákup Mikkelsen) var á venjingarlegu síðst í januar. Herfølge skal taka lut í kapping við onnur feløg úr norðurlondum. Teir koma aftur til Danmarkar annan leygardag.

Fyrsti landskappingardysturin hjá Herfølge verður á grækarismessu. Sunnudagin um fýra vikur skulu teir á útivølli spæla móti Lyngby og sunnudagin eftir fáa teir vitjan av Brøndby.

Í Danmark verður ikki mett, at Herfølge fer at megna at halda tørn um oddasessin. Har verður heldur mett, at Brøndby, sum hevur skift venjara og hevur fingið fleiri norskar og svenskar stórspælarar í felagið, fer at vinna DM. Jákup Mikkelsen hevur ofta sagt, at teir hava lítlar møguleikar, tí kappingin frá peningasterku feløgunum er so stór. Men nú fáa vit at síggja. Herfølge hevur økt um venjingina, og tað boðar frá, at teir ikki uttan víðari ætla at geva skarvin yvir. Men skal tað eydnast at vinna DM, so man fyrsta treytin vera, at teir eru ellivu á vøllinum hvørja ferð og alla tíðina.

Herfølge er á odda í superliguni við 37 stigum. Brøndby er á øðrum plássi. Teir hava 31 stig. Átjan umfar eru spæld, og tað verður í fimtan teimum síðstu av í alt 33 umførum, at funnið verður fram til meistaraliðið.

Í sambandi við 1–1 javnleikin móti B93 er vert at leggja afturat, at gamla felagið á Eysturbrúgv tykist vera væl fyri. B93 droymir um at endurvinna sessin í bestu deildini, sum teir so ofta hava havt, og teir eru væl fyri. Umframt at spæla javnt móti Herfølge, so hava teir eisini spælt javnt móti Lyngby (0–0) og AB (1–1). Móti OB hava teir tapt venjingardyst 2–1

JH

# Sviar bardust í Parkini

Todi Jónsson og hinir í FCK fóru sunnukvøldið á tólv daga venjingarlegu í Suðurafrika

Talan skuldi vera um vinardyst, tá gamla svenska stórfelagið, IFK Göteborg, sum hevur sæð betri dagar, enn teir gera nú, leygardagin var í Parkini og dystaðist móti FCK við Toda Jónsson á liðnum.

Men tað var ikki serliga vinarligt. Inni á vøllinum var strítt og arbeitt soleiðis sum tað eigur at vera gjørt av liðum, ið fyrireika seg at vera millum tey bestu og av spælarum, sum fegnir vilja vísa, at júst teir hoyra heima á besta liðnum.

Tað var kring vøllin, at tað ikki var serliga vinarligt. Svenska liðið hevði viðhaldsfólk við bæði úr Göteborg og Helsingborg. Og longu undan dystinum kom tað til ilnar millum svensku býirnar. Helsingborg áskoðararnir fóru knappliga at taka á við FCK, og so var áfast. Løgreglulið møttu upp, teir kendu seg noyddar at brúka kniplarnar. Undan dystinum vóru teir noyddir at handtaka fimm áskoðarar, og eftir dystin handtóku teir trý fólk. Hinar mælsku og østu sviarnar fylgdu løgreglumenninir oman til tvíkiljurnar í miðbýnum.

### 12 dagar í Suðurafrika

Todi Jónsson, sum er væl fyri, var á liðnum hjá FCK inntil tað restaðu smáir tjúgu minuttir. FCK vann 2–0 á IFK Göteborg. Thomas Thorninger skoraði fyrra málið, og tað seinna skoraði norðmaðurin Harald Brattbak, sum FCK hevur keypt frá Celtic í Skotlandi.

Sunnukvøldið lætti FCK úr Kastrup. Leiðin gekk til Suðurafrika, har teir skulu vera í tólv dagar. Umframt venjing eru tríggir og kanska fýra dystir á skránni.

FCK er á áttanda plássinum í superliguni. Teir hava 24 stig, og venjarin, Kim Brink, heldur ikki, at heiðursmerkjaplássini eru púra farin úr eygsjón. Men skal tað eydnast at stríðast fyri oddasessunum, so er alneyðugt, at FCK fær fulla úrtøku, tá teir á grækarismessu skulu til Aalborg og vikuna eftir fáa vitjan av AB. Um FCK einki fær burturúr hesum dystunum, so kann tað verða so skjótt, at teir fara at kenna niðurflytingar hóttanina brenna undir sær. Liðið hjá Óla Johannesen, AGF, hevur átjan stig, OB hevur seytjan stig, og á niðurflytingarplássunum hava Esbjerg og Vejle ávikavíst 14 og 12 stig.

Undan fráferðini til Suðurafrika hava teir í FCK ikki ligið á løtu síðuni. Teir hava vant tíggju ferðir um vikuna. Málið hevur verið at fáa likamligu venjingina upp á pláss og at venja 4–2–3–1 spælstílin, sum teir við góðari úrtøku brúktu nógv av heystinum.

JH



Sannur ruðulleiki tók seg upp, tá Todi Jónsson og liðfelagarnir um vikuskifti leikti venjingardyst móti svenska IFK Gøteborg



# Pinkutjóðir bjóða okkum av

Bæði Lichtenstein og Bermuda hava sýnt áhuga fyri at fáa dystir móti føroyska a-landsliðnum í fótbólti, og í løtuni eru innbjóðingarnar frá hesum til viðgerðar hjá FSF

Jákup Mørk

Fótbóltssambandið ivast í løtuni í, hvørt teir skulu taka av eini innbjóðing, sum smátjóðin, Lichtenstein, hevur sent hendavegin.

Í fyrstu atløgu ætlaðu fótbóltsleiðararnir í smátjóðini, at Føroyska landsliðið skal til Lichtenstein at spæla ein dyst, men sambært Torleif Sigurðsson er áhugin fyri hesari loysn rættuliga avmarkaður her í Føroyum.

### Fíggjarligur spurningur

Upprunaliga varð nevnliga skotið upp at FSF skuldi bera ferðakostnaðin til Lichtenstein, meðan vertirnir so bera kostnaðin av uppihaldinum, men hetta halda føroyingarnir ikki vera nøktandi.

Útreiðslurnar av eini slíkar ferð eru somikið stórar, at um hetta skal gerast veruleiki, vil FSF afturfyri fáa ein retur dyst her á landi. FSF skeyt tískil upp, at ein dystur skuldi verða í Føroyum í juni mánaði, men men hetta liggur ikki fyri hjá mótstøðuliðnum, og tískil tykist tað nú vera rættuliga ivasamt, um nakar dystur verður.

Verður hetta aktuelt, verður helst talan um ein heimadyst í komandi ári, men tá standa føroyingar í teirri støðu, at aktiviteturin hjá landsliðið okkara er sera stórur, umframt at Fótbóltssambandið eisini hevur fingið eina innbjóðing úr Bermuda um koma har yvir at spæla ein landsdyst.

At fara slíkar ferðir er ikki bara at siga tað, og Torleif leggur afturat, at leysliga mett kostar tað Fótbóltssambandinum einar 300.000 kr. hvørja ferð A-landslið okkara skal út um landoddarnar at royna seg.

### Stórar broytingar

Av sonnum kann sigast, at tað nú er viðvent í holuni, hvat viðvíkur landsliðsfótbólti. Fyri ikki so nógvum árum síðani, fóru leikarar og fótbóltsleiðarar glaðbeintir avstað, tá vit vóru so hepnir, at onkur tjóð tímdi at spæla ímóti okkum.

Torleif ásannar eisini, at teir nú taka nógv fleiri lutir við í viðgerðini av hesum spurningum. Ein av orsøkunum til hetta er, at eingin longur fer ókeypis avstað,



Føroyska a-landsliðið er við tíðini vorðið eitt áhugavert mótstøðulið hjá øðrum smátjóðum, og í dag eru innbjóðingarnar mest sum ov nógvar í tali

tá landsliðið kallar. Hetta skal ikki skiljast sum nakað negativt, men er einans ein staðfesting av, at tað ikki ber til í eitt longri áramál at krevja, at landsliðsleikarar skulu missa eina rúgvu av arbeiðsdøgum, og harvið inntøkum, tá teir eru úti við landsliðinum.

Har umframt verður nú eisini mett, um ætlaðu dystirnir tæna nøkrum ítróttarligum endamáli. -Fyrr fóru vit avstað, hvørja ferð onkur spurdi, men í dag skal tað helst verða soleiðis, at dysturin kann nýtast sum t.d. venjing undan einum undankappingardysti, sigur formaðurin hjá FSF.

Hvussu verður og ikki við hesum dysti, er sostatt enn ikki avgjørt. Føroyingar skulu tó ikki vænta sær, at talan verður um fleiri enn teir báðar landsdystirnar móti Danmark og Slovenia á føroyskari jørð í hesum ári.

# Petur Mohr venur ÍF

Bogi Lervig heldur fram sum hjálparvenjari hjá niðurflytarunum úr 1. deild, sum sakna fleiri av spælarunum frá í fjør

Fuglfirðingar eru farnir undir fyrireikingarnar til komandi kappingarár. Málið hjá ÍF er sjálvsagt at endurvinna plássið í bestu deildini, sum teir mistu síðsta leikdag í heyst. Um tað fer at eydnast at vinna næstbestu deildini er ein onnur søga. Teir hava fingið ein royndan venjara og ein royndan hjálparvenjara, men enn tykist tað at knípa eitt sindur, tá tað snýr seg um spælararnar.

Petur Mohr, sum traðkaði sínar barnaskógvar í Fuglafirði, har hann viðhvørt plagdi at verja málið í yngru deildunum, hevur ábyrgdina av venjingini hjá ÍF. Hjálparvenjari er ein annar av gomlu fótbóltsmonnunum í Fuglafirði. Bogi Lervig, sum hjálpti Piotr Krakowski, er eisini hjálparvenjari hjá Peturi Mohr, sum er ein av royndastu venjarunum í landinum. Hæddarpunktið hjá honum var, tá hann í 1991 var venjari hjá KÍ, sum vann FM heitið.

ÍF hevur fingið nýggjan málverja í ár. Allan G. Joensen er ikki ókendur í Fuglafirði, tí tað er har, at hann er uppvaksin og býr. Men tey seinnu árini hevur hann spælt fótbólt á Toftum, og í fjør vardi hann málið á besta liðnum hjá B68 í øllum níggju landskappingardystunum eftir summarsteðgin. Nú venur Allan G. Joensen í Fuglafirði.

### Fleiri mangla

Í fjør vardu Rúni Joensen og Erling Joensen málið hjá ÍF, men tað er greitt, at hvørgin teirra fer at spæla við ÍF í ár. Erling Joensen siglir úti í verðini, og Rúni Joensen hevur gjørt avtalu við NSÍ um, at hann skal spæla við teimum.

Burtursæð frá málverjanum hevur ÍF ikki enn fingið spælarar aðra staðni frá. Men fleiri teirra, sum vandu og spældu í fjør, hava ikki enn verið til venjingar, ella leika nú við øðrum feløgum. Tað snýr seg um Rógva Róin, Eyðun Samuelsen, brøðurnar Bárður og Høgna á Lakjuni og so pólverjarnir báðar, Robert Ciezlewicz og Tomasz Przybliski.

Robert verður komandi árið at síggja í ríputa VB búnanum, meðan framtíðin hjá Tomasz enn tykist nakað ógreið. Pólverski verjuspælarin býr í Fuglafirði. Hann hevur higartil vant bæði í Fuglafirði og í B36, har Piotr Krakowski er hjálparvenjari. Enn er eingin avtala gjørd um, hvar Tomek fer at spæla.



Rógvi Róin telist millum teirra, sum enn ikki hava verið til venjingar

JH

